

*Meðan Kyndils-leikararnir við boygdum høvdum fóru av vøllinum, var fagnaðurin øgiligur hjá Stjørnuni, eftir at tær í seinastu minuttunum høvdu koppað vágskálini í dystinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Kyndil-Stjørnan 25-26 (11-10):

# Kyndil rætti Stjørnuni lítlafingur

**Í 50 minuttir hevði Kyndil tamarhald á tí mesta av tí, sum gekk fyri seg í dystinum móti Stjørnuni, men tá Stjørnan fekk møguleikan, struku tær framvið teimum grønu**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Óstabilu úrslitini í bestu kvinnudeildini í hondbólti vórðu enn einaferð undirstrikað, tá Kyndil tók ímóti Stjørnuni í Høllini á Hálsi mikukvøldið. Undan hesum kappingarárinum varð Kyndil mett sum eitt av teimum sterkaru liðunum í kvinnudeildini, men hóast gott fólk, so hevur úrtøkan í einstøku dystunum tó verið so sum so. Við sigrinum á VÍF fyri viku síðani var tó líkt til, at nú hevði Kyndil funnið stevið, og hetta skuldi so meira ella minni váttast, tá Stjørnan kom á vitjan.

Leingi var eisini líkt til, at tað skuldi eydnast hjá Kyndli at fáa annan sigurin upp í slag. Eftir eina heldur tama byrjan, var tað so hampuliga skjótt, at Kyndil setti seg á dystin, og við einum rykki miðskeiðis í fyrra hálvleiki tóku tær seg nøkur mál fram um Stjørnuna. Spælið var kanska ikki av tí besta hjá nøkrum av liðunum, men Kyndil hevði betri tak á í verjupartinum, og tað var kanska fyrst og fremst hetta, sum gjørdi munin.

Og tann munurin helt sær so at siga eisini allan dystin. Onkun tíð hevði Stjørnan hug at nærkast, men hvørja ferð tað gjørdist ov tætt, so setti Kyndil eitt sindur meira á, og so var munurin aftur hin sami.

### Fingu løn fyri stríðið

Stjørnan slepti tó ongan tíð vónini um, at tað skuldi fara at bera til hjá teimum. Tær hildu á fram at stríðast, og knappar tíggju minuttir fyri leiklok vóru brádliga útlit fyri, at tær eisini skuldu fáa løn fyri stríðið. Onkursvegna mistu leikararnir hjá Kyndli fullkomuliga konsentratiónina eina løtu. Nøkur óneyðug mistøk vórðu framd í álopspartinum, og tað var eitt-tvey-trý, so hevði Stjørnan revsað hesi.

Eina lítla løtu var mest sum panikkur á liðnum hjá Kyndli. Leikararnir tókutst mest av øllum overva seg í royndunum at rætta dystin uppaftur, heldur enn at sláa kalt vatn í blóðið, og hesa panikkstøðu fekk Stjørnan gjørt sær dælt av, soleiðis at tær nú brádliga vóru tvey mál frammanfyri.

Kyndil royndi at svara aftur, og tær vunnu seg eisini upp á javnt, men seinastu løtuna av dystinum stóð aftur stilt hjá teimum. Hóast seinasta málið hjá Stjørnuni kom so tíðliga sum tríggjar minuttir fyri leiklok, so megnaði Kyndil ongan tíð veruliga at hótta eftir hetta. Skelkurin um at missa leiðsluna tóktist vera alt ov stórur, og við longum og róligum álopunum tók Stjørnan seinatu luftina úr dystinum.

### Trúgvin á muni

Einki er at taka seg aftur í, at fyri Kyndil, so var tapið eitt álvarsligt bakkast. Eftir sigurin á VÍF tóktist kósin vera sett beina leið uppeftir, men onkursvegna megnaðu tær tó ikki at fylgja hesum upp.

Hóast misjøvnu avrikini gera, at Kyndil nú helst kann gloyma alt um at enda ovast í grundspælinum, so eiga tær grønu á ongan hátt at avskrivast í samlaðu kappingin. Hópurin tykist á pappírinum framvegis at vera ein hin sterkasti í landinum, men tað er kanska eina mest á mentala økinum, at leikararnir nú skulu venjast. Ein partur av spælinum er jú sálarliga styrkin, har leikararnir skulu tora og duga at vera á odda, og tað tykist fyrst og fremst vera hesin eginleikin, sum skal til. Eftir tvey ár í botnstríði, kann tað vera trupult hjá leikarunum at venja seg við, at tær nú brádliga »eiga« at vinna dystirnar. Talan er snøgt sagt um at bróta eina ringrás og byggja eina aðra upp, men enn hevur Kyndil so ikki megnað at gjørt hetta.

Hjá Stjørnuni er hinvegin einki at ivast í, at talan var um tvey sera kærkomin stig. Undan árinum tóktist stórur ivi valda um, hvørt Stjørnan yvir høvur fór at taka lut í kappingiini. Tað eydnaðist kortini at skava eitt lið saman, og við fimm stigum á talvuni er hetta nú mitt í rokanum millum tey, sum elta oddafiskarnar úr Vági.

Talan er kanska ikki um sama poleraða spælið, sum seinnu árini hevur hildið Stjørnuni á føroysku hondbóltstindunum, men í stóran mun hava leikararnir kompensera fyri hetta við einumotroyttandi stríðsvilja.

Og so dugir Stjørnan eisini at vinna. Góðu úrslitini seinastu trý árini hava givið leikarunum eina trúgv á egnan mátt, sum fá onnur lið hava. Ein trúgv, sum ger, at hóast mótrákið til tíðir er hart, so fellur liðið ikki í fátt, og so leingi sum tann trúgvin er til staðar, kann liðið ongan tíð avskrivast heilt.

### Dysturin í tølum

**Kyndil-Stjørnan 25-26 (11-10):**

Málskjúttar:
Kyndil: Lotte Sørensen 9(4), Ileana Manolescu 5, Ann Mari Vang 4, Heidi Maria Akselsen 3, Sonja Smiljic 2, Marjun Tróndarson 2, Annika Ljósstein 2, Ann Hansen 1, Marjun Johansen 1
Stjørnan: Natsha Stemnkovic 9, Danijela Ercevic 6(1), Una Olsen 6, Jastrid Gullaksen 4, Mira við Neyst 1
Brotskøst: Kyndil 4, Stjørnan 1
Útvísingar: Kyndil 4, Stjørnan 4
Dómarar úr H71: Hallur Danielsen & Bárður Brimvík. Høvdu ikki alla tíðina eins væl fatur á dystinum, men fáa teir fleiri dystir saman, er einki at ivast í, at hetta er nakað, sum fer at betrast.



# Eitt stig í part til útisetar

**Randers Freja er á triðja plássi og Vejle er nummar sjey, nú næstbesta danska deildin er farin í vetrarfrí**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Fótbóltsútisetarnir Atli Gregersen í Randers Freja og Christian Høgni Jacobsen í Vejle, hava nú fingið vetrarfrí frá landskappingini. Næsta umfarið verður spælt 16. mars.

Mánakvøldið hevði Vejle vitjan av Randers Freja. Dysturin varð vístur á Viasat rásini. Viljin hjá spælarunum var góður, meðan spælið ikki var so polerað, sum tað ofta er í sjónvarpsdystum.

Christian Høgni Jacobsen var á vongverjanum hjá Vejle, meðan Atli Gregersen ikki var á Randers liðnum. Úrslitið var 2–2. Tað fegnaðust teir á heimaliðnum um, meðan tað ikki var at undrast á, at teir í Randers Freja iðraðu seg. Gestirnir løgdu seg framum longu í 2. minutti. Tá ið teir eitt korter undan leikloki skoraðu til 2–0, tóktist alt vera avgjørt.

Heimaliðið hevði í 2. hálvleiki trýst fyri at javna. Tí kom tað sum vátur vøttur, tá ið Randers Freja økti til 2–0 eftir snarálop. Men Vejle menninir góvu ikki skarvin yvir, og íðinskapurin loysti seg. Fýra minuttir eftir seinna Randers málið minkaðu teir um munin, og átta minuttir undan vetrarsteðginum javnaðu teir til 2–2.

Randers Freja hevði møguleikan at halda vetrarfrí á næstfremsta plássinum. At teir bara fingu eitt stig burturúr í Vejle hevur við sær, at Randers Freja er nummar trý. Herfølge og Frem eru á uppflytingar plássunum.

### Lars Olsen til Randers

Í gjár var greitt, at tað verður Lars Olsen, sum á nýggjárinum verður nýggur venjari í Randers Freja. Hann skal loysa Kim Poulsen av. Sáttmálin við nýggja venjaran verður galdandi inntil á sumri í 2004.

Hetta er fyrsta ferðin, at Lars Osen skal hava ábyrgdina av einum divisiónsliði. Hann hevur í mong ár verið í Brøndby. Síðstu tíðina hevur hann verið venjari hjá unglingunum. Tá ið Åge Hareide og Tom Køhlert vóru venjarar, var Lars Olsen hjálparvenjari. Tað plássið misti hann, tá ið Michael Laudrup gjørdist venjari.

Lars Olsen var liðformaður í Brøndby í mong ár. Hann var eisini liðformaður á danska landsliðnum. Saman við Henrik Larsen, venjaranum hjá føroyska landslliðnum, var hann við til at vinna EM kappingina, sum í 1992 varð spæld í Svøríki.

# So er tað staðfest

**Í knappar tveir mánaðir hevur ljóðað, at Frank Skytte skal venja HB komandi kappingarár, og nú hevur leiðslan í felagnum boðað frá, at partarnir hava skrivað undir tvey ára sáttmála**

HB-VENJARIN
*Jákup Mørk*

24. september skrivaðu vit á hesum síðum, at Frank Skytte, sum júst um tað mundið fór niður til Danmarkar, eftir at hann varð uppsagdur av B68, skuldi venja HB komandi kappingarár.

Ta ferðina vórðu tíðindini avsannað av leiðsluni í HB, sum segði, at felagið tosaði við fleiri venjarar, men at enn var einki avklárað venjaraspurninginum viðvíkjandi. Keldur nær HB hildu tó fast um, at har var eingin ivi, og týskvøldið varð veruleikin so staðfestur, tá leiðslan í HB sendi út tíðindaskriv, har boðað varð frá, at Frank Skytte skal venja besta lið felagsins.



Skytte er á veg til HB

*24. september skrivaðu vit á hesum síðum, at Frank Skytte var ávegis til HB, men tíðindini vórðu tá avsannað. Hvussu er og ikki, so hevur leiðslan í HB nú endaliga staðfest, at Frank Skytte skal venja besta manslið felagsins komandi ár*

Afturat sær hevur Frank Skytte Oddbjørn Joensen, sum í fjør var hjálparvenjari hjá B36, men sum annars hevur hampuliga drúgvar royndir í eitt nú HB. Umframt teir báðar verður Kári Nielsen, sum í fjør endaði árið sum annar av høvuðsvenjarunum í felagnum, eisini knýttur at liðnum. Saman skulu hesir tríggir so taka sær av venjingini hjá teimum báðum fremstu manslóðunum í felagnum umframt at teir eisini skulu venja unglingarnar.

### Gamalt samband

Hóast tað sum nevnt er hálvur annar mánaður síðani, at søgurnar um nýggja venjaran fingu bein at ganga á, so heldur formaðurin í HB, Birgir Enghamar, fast um, at tað ikki er fyrr enn nú, at hetta er endaliga komið upp á pláss.

- Sáttmálin er ikki so mikið sum skrivaður undir enn, men vit eru komnir ásamt um treytirnar, og fríggjadagin kemur Frank so til Føroya, so undirskriftin kann fáast í rættlag.

Hóast hann ikki vil viðganga, at HB og Skytte langt síðani hava givið hvørjum øðrum sítt lyfti, so sigur Birgir Enghamar, at sambandið millum partarnar ikki er heilt nýtt.

- Frank var jú her uppi við Hvidovre fyri góðum ári síðani í sambandi við ólavsøkudyst. Ta ferðina prátaðu vit væl saman, men talan varð ikki um at seta hann sum venjara, tí vit høvdu jú Ion Geolgau. Tað var tó í tonkunum, at hetta kanska kundi verið ein møguleiki í framtíðini, og hóast tað ikki hevur verið talan um samráðingar, so hava vit alla tíðina hildið sambandið við líka, sigur formaðurin um hetta.

## 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 6 | 6 - 0 - 0 | 147 | 120 | 27 | 12 |
| 2 | VÍF | 6 | 3 - 0 - 3 | 135 | 123 | 12 | 6 |
| 3 | Kyndil | 7 | 3 - 0 - 4 | 176 | 167 | 9 | 6 |
| 4 | StÍF | 6 | 3 - 0 - 3 | 147 | 152 | -5 | 6 |
| 5 | Neistin | 6 | 2 - 1 - 3 | 116 | 122 | -6 | 5 |
| 6 | Stjørnan | 6 | 2 - 1 - 3 | 122 | 130 | -8 | 5 |
| 7 | Tjaldur | 5 | 1 - 0 - 4 | 102 | 131 | -29 | 2 |

## Borðtennisúrslit

**Opin kapping í borðtennis var fyriskipað í Trongisvági um vikuskiftið, ogniðanfyri prentað vit endaligu úrslitini í ymsu aldursbólkunum**

**Smápiltar:**
Einmansleikur:
Nr.1 Jónhard Ferjá, TBF
Nr.2 Teitur Justinussen, TBF
Nr.3 Martin Midjord, TBF

Tvímansleikur:
Nr.1 Jónhard Ferjá og Teitur Justinussen, TBF
Nr.2 Martin Midjord og Jákup Thomassen, TBF

**Pinkur:**
Einmansleikur:
Nr.1 Susie Midjord, TBF
Nr.2 Rakul Mikkjalsdóttir, TBF
Nr.3 Sheila Strøm, TBF

Tvímansleikur:
Nr.1 Rakul Mikkjalsdóttir og Susie Midjord, TBF
Nr.2 Joan Thomasen og Sheila Strøm, TBF

**Piltar:**
Einmansleikur:
Nr.1 Gilli Sørensen, TBF
Nr.2 Bárður Láadal, Streymur
Nr.3 Fróði Jensen, TBF

Tvímansleikur:
Nr.1 Fróði Jensen og Gilli Sørensen, TBF
Nr.2 Heini Mortensen og Kjartan Niclasen, TBF

**Smágentur:**
Einmansleikur:
Nr.1 Marin í Dali, TBF
Nr.2 Anntóra í Dali, Streymur
Nr.3 Jonvør Joensen, TBF

Tvímansleikur:
Nr.1 Marin í Dali og Mariann Mikkjalskóttir, TBF
Nr.2 Anntóra Láadal og Rudi Zachariasen, Streymur

**Smádreingir:**
Einmansleikur:
Nr.1 Sigurð Carlsson, TÓR
Nr.2 Gunnar í Dali, TBF
Nr.3 Sjúrður Ferjá, TBF

Tvímansleikur:
Nr.1 Sjúrður Ferjá og Gunnar í Dali, TBF
Nr.2 Reidar Luid og Rógvi Holm, TÓR

**Dreingir:**
Einmansleikur:
Nr.1 Ragnar Egilsson, TÓR
Nr.2 Jóhan Petur Holm, TÓR
Nr.3 Christian R. Mouritsen, TÓR

Tvímansleikur:
Nr.1 Ragnar Egilsson og Sigurð Carlsson, TÓR
Nr.2 Reidar Luid og Rógvi Holm, TÓR

**Gentur:**
Einmansleikur:
Nr.1 Rakul Magnussen, Streymur
Nr.2 Mildrið Djurhuus, Streymur
Nr.3 Rigmor Zachariassen, Streymur

Tvímansleikur:
Nr.1 Mildrið Djurhuus og Rakul Magnussen, Streymur
Nr.2 Vár Hansen og Eydna Jespersen, TBF

**Kv. Unglingar:**
Einmansleikur:
Nr.1 Maria Zachariassen, Streymur
Nr.2 Elisa Abrahamsen, Streymur
Nr.3 Birita Joensen, Streymur

Tvímansleikur:
Nr.1 Maria Zachariassen og Elisa Abrahamsen, Streymur
Nr.2 Rigmor Zachariassen og Birita Joensen, Streymur

**Mansunglingar:**
Einmansleikur:
Nr.1 Rógvi Hansen, TÓR
Nr.2 Allan Smedemark, TBF

**Meðaldeild, menn:**
Einmansleikur:
Nr.1 Rógvi Hansen, TÓR
Nr.2 Ragnar Nólsøe, TBF
Nr.3 Andras Nólsøe, TBF

Tvímansleikur:
Nr.1 Andras Nolsøe og Kai Roest, TBF
Nr.2 Sverre Midjord, TBF og Rógvi Hansen, TÓR

**Meistaradeild, menn:**
Einmansleikur:
Nr.1 Peter Niclasen, TÓR
Nr.2 Fríði Jensen, TBF
Nr.3 Eyðun Luid, TÓR

Tvímansleikur:
Nr.1 Eyðun Luid og Peter Niclasen, TÓR
Nr.2 Fríði Jensen og Vagnur Nólsøe, TBF